# Stilla eksplosjónin

**Uttan at gera stórvegis háva burturúr sær sjálvum hevur Sambandsflokkurin skotið seg langt fram um hinar flokkarnar. Tað vísir nýggjasta veljarakanningin. Fólk vilja heldur hava stabilitet og siðiligheit enn buldur og brak. Í dystinum um veljaran mugu Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin lúta. Javnaðarflokkurin stendur í stað, hóast hann ofta reiggjar svørið**

GREINING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*







Sambandsflokkurin er framvegis størsti flokkur í Føroyum. Ein veljarakanning sum Gallup hevur gjørt fyri Dimmalætting og SVF, vísir greitt, at sitandi samgongu missir størri og størri undirtøku millum veljararnar, meðan andstøðan gongur fram.

Tjóðveldisflokkurin hevur mist heili 4 prosent stig, síðan seinasta løgtingsval, meðan Sambandsflokkurin hevur tikið eitt risalop, og nærkast einum triðingi av samlaða veljaraskaranum í Føroyum.

Tað er eisini hugvekjandi, at Miðflokkurin, sum vanliga klárar seg illa í veljarakanningunum, stendur til at fáa tveir mans inn á ting, um val hevði verið í morgin

## Heili 10 tingmenn

Føroya elsti flokkur, Sambandsflokkurin, hevði sambært veljarakanningini heili 10 tinglimir, um val var í morgin. Seinast, nakar flokkur fekk so stóra undirtøku til eitt løgtingsval, var í 1990, tá Javnaðarflokkurin hevði metval, og fekk 10 umboð í løgtingið.

Lisbeth L. Petersen sigur í viðtalu við Dimmalætting í dag, at orsøkin til góða úrslitið er, at veljararnir trúgva á stevnuskránna hjá Sambandsflokkinum.

Hvussu er og ikki, so er tað ein sannroynd, at størsti andstøðuflokkurin hevur hildið seg í bakgrundini hetta valskeiðið. Flokkurin hevur latið samgonguna stríðast í friði og náðum. Sammetir tú leiklutin hjá andstøðuflokkunum báðum, Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin, so er tað Javnaðarflokkurin, ið hevur leikað meira í.

Meðan Javnaðarflokkurin í seinastu mánaðarnir hevur verið í opnum stríði við serliga Tjóðveldisflokkin, hevur Sambandsflokkurin verið meira ein afturhaldin andstøðuflokkur, og tað hevur eftir øllum at døma givið úrslit.

Lisbeth L. Petersen, at flokkurin leggur minni í profiliering av persónum og einstøk rokmál. Henda støða lýsir væl Sambandsflokkin 2003. Flokkurin hevur ikki verið í andglettinum í nøkrum av rokmálunum hetta valskeiðið, sum aðrar flokkar hava verið.

Tað er heldur ikki nakað dulsmál, at flokkurin ikki hevur ein so eyðsýndan floksleiðara sum hinir flokkarnir. Sammett við hinar floksleiðararnar, so skerst ikki burtur, at Lisbeth L. Petersen hevur minni gjøgnumslagskraft, men hvussu vendur og ikki, so vísa úrslitini, at flokkurin er á rættari kós.

## Nýggj andlit

Seinasta løgtingsval vórðu fleiri nýggir tinglimir fyri Sambandsflokkin valdir á ting, og nýggi tinglimirnir hava givið flokkinum sterkari bein at ganga á. Nýggju tinglimirnir leggja størri dent á sosialpolitisku síðuni hjá flokkinum, enn ríkisrættarligu støðuna.

Gjøgnum stóran part av nítiárunum var tað serliga ríkisrættarliga støðan hjá flokkinum, ið var í hásæti, meðan borgarligi politikkurin var í bakgrundini. Nýggju andlitini, Johan Dahl, Kaj Leo Johannesen og Bárður Nielsen tykjast hava størri tokka til borgarliga politikkin hjá flokkinum, enn ríkisrættarligu støðuna og tað styrkir um veljaragrundarlagið

Góða úrslitið hjá Sambandsflokkinum skal helst síggjast í ljósinum av, at flokkurin hevur hildið burtur frá teimum stóru rokmálunum, bæði innanhýsis í samgonguni, og millum serliga Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkinum, sum eftir øllum at døma hevur gjørt størri skað enn gagn hjá hinum flokkunum.

Ivamálið um sjálvstýrissleistin hjá samgonguni kemur eisini avgjørt Sambandsflokkinum til góðar, tí flokkurin tykist verða tað einasta greiða alternativið til samgonguna. Javnaðarflokkurin hevur søguliga sæð bæði rúmað sjálvstýrisfólk og sambandsfólk, og tí er støðan hjá flokkinum vanliga heldur ógreið í sjálvsstýrisspurninginum. Helst hava fólk trupult við at skilja, hvat Javnaðarflokkurin vil, tí hann brádliga sigur seg liggja fremst í sjálvstýrisstríðnum.

## Aftur á gamlar gøtur

Samfelagsfrøðingurin, Jóannes Hansen, vísti mánakvøldið í Degi og Viku á, at nakað bendir á, at Tjóðveldisflokkurin er á veg aftur á gamlar gøtur. Søguliga sæð plagar flokkurin at liggja á einum fimtingi av samlaða atkvøðutalinum.

Á løgtingsvalinum í 1998 hevði Tjóðveldisflokkurin metval, og legði seg undir liðina á hinum stóru flokkunum við góðum 25 %. Síðan hevur gingið javnt niður at bakka hjá flokkinum, og sambært veljarakanningini hjá Dimmalætting og Gallup fær flokkurin bert 19,9 % av atkvøðunum, um val var í morgin

Tað er ein sannroynd, at sjálvstýrismálið koyrir við einum lægri blussi, enn tað hevur gjørt. Tað hevur havt við sær, at høvuðsmálið, ið helt Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin saman, er farið nakað í bakgrundina sammett við seinasta samgonguskeið.

Hetta hevur havt við sær, at onnur mál eru farin at seta politisku dagskránna, har hugsjónarligu mótsetningarnir hjá Fólkaflokkinum og Tjóðveldisflokkinum rættiliga koma fram í ljósið. Fleiri dømi eru hetta valskeiðið um rokmál í samgonguni, har serliga samgongulimir í Tjóðveldisflokkinum og Fólkaflokkinum hava verið í opnum stríði í fjølmiðlunum.

Hóast báðir flokkarnir hava sagt alment, at innanhýsis stríðsmál skulu viðgerast innanhýsis í samgonguni, og ikki í fjølmiðlunum, so tykist stríðið millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin halda fram

Afturvendandi stríðsmálini millum samgongulimir skapa neyvan nakað álit til veljaran, og tað kann tí tykjast sum um, at samgongan verður revsað fyri vantandi samgongustev hetta valskeiðið.

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Høgni Hoydal, sigur við Dimmalætting, at tað er bráðneyðugt, at Tjóðveldisflokkurin fær nøkur praktisk úrslit á borðið. Hann sipar til, at tað verður avgerandi fyri Tjóðveldisflokkin, hvussu yvirtøkulógin fer at eydnast. Tað tykist rættiliga avgerandi fyri samgongufIokkarnir, at yvirtøkulógin fer at eydnast, tí annars bendir nógv á, at fullveldisætlanin hjá sitandi samgongu kollsiglir.

Hjá Tjóðveldisflokkinum tykist ringast standa til, tí flokkurin kann væl fullkomiliga enda uttanfyri ávirkan eftir komandi løgtingsval, um flokkurin ikki fær víst meir enn hann kann í dag á sjálvsstýrisleið.

Hin stóri samgonguflokkurin, Fólkaflokkurin, gongur eisini aftur. Hann fær bert seks tinglimir, um val var í morgin. Kortini tykist Fólkaflokkurin hava eitt eyka kort í hondini, um sitandi samgonga ikki megnar at halda fram. Ein møgulig samgonga millum borgarligu flokkarnar tykist ikki verða heilt veruleikafjar. Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin borga báðir fyri borgarligum politikki, og ein semja um ríkisrættarliga spurningin nýtist ikki verða heilt ógjørlig, tá ein veit um, at innanhýsis í Fólkaflokkurin eru bæði sambands- og sjálvstýrissinnað.

## Fullveldissamgongan 13 tinglimir

Tað er rættiliga hugvekjandi, at gamla fullveldissamgongan frá 1998 í veljarakanningini bert fær 13 tinglimir. Sjálvstýrisflokkurin missir sína umboðan í Løgtinginum, meðan bæði Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin missa ein tingmann.

Fullveldissamgongan við Sjálvstýrisflokkinum, Fólkaflokkinum og Tjóðveldisflokkinum fær sostatt bert 13 tinglimir av teimum 32. Vantandi undirtøkan fyri fullveldissamgonguni má sigast at verða eitt veruligt tekin um, at undirtøkan fyri sjálvsstýrisleistinum hjá samgonguflokkunum minkar í hvørjum

## Miðflokkurin gongur fram

Einasti samgonguflokkur, ið gongur fram í veljarakanningini, er Miðflokkurin. Hóast Bill Justinussen ikki heilt vil taka undir við, at fosturtøkuspurningurin hevur verið við til at geva Miðflokkinum vind í seglini, so er tað uttan iva ein av høvuðsorsøkunum.

Miðflokkurin hevur miðvíst hetta valskeiðið verið út um seg við greiðum sjónarmiðjum um etisk mál, og tykist hava givið flokkinum størri undirtøku millum føroyska veljaran. Fosturtøka, samkynd, rúsdrekka og pornografi eru øll evni, sum Miðflokkurin hevur verið í miðdepilinum við farna árið.

Etisk mál hava flestu fólk eina støðu til, og hóast júst tey evnini ikki vanliga eru ein týðandi partur av politiska kjakinum í Føroyum, so er tað ein sannroynd, at etisku málini hava fingið størri rúmd í politiska kjakinum, enn tey hava gjørt leingi.

Miðflokkurin ger sær dælt av, at flokkurin fyri fyrstu ferð er í samgongu, og harvið fær ein gyltan møguleika at føra sína grundsjónarmið fram. Tað kann ikki takast frá flokkinum, at hann hevur megnað sína uppgávu til fulnar, tíhann gongur nógv fram.

Stóra undirtøkan fyri flokkinum er áhugaverd, tí Miðflokkurin stendur seg vanliga illa í veljarakanningum, og tí kennist tað óivað rættiliga fjálgt hjá miðflokkafólki í hesum døgum.



# - Vit eru fyri vanbýti í Eiðis kommunu

**Dan Kruse Thomsen, sum er ættaður av Eiði, men býr í Svínáum, heitir á Eiðis kommunu um at bøta um ferðsluviðurskiftini og gøtuljósini í Svínáum.**

**- Tað eru nógvir bilar, sum koyra alt ov skjótt gjøgnum bygdina. Eftir bygdarvegnum eru bert seks gøtuljós, og tað er bæði ótrygt og vandamikið hjá fólki at ganga úti, tá ið tað er vorðið myrkt, sigur hann**

FERÐSLUTRYGD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*- Vit eiga at fáa vegaforðingar á bygdavegin og fleiri gøtuljós. Aftrat hesum eiga skelti, sum vísa loyvdu hámarksferðina, at verða sett upp, sigur Dan Kruse Thomsen, sum býr í Svínáum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Dan Kruse Thomsen heldur ikki, at allir borgarar í Eiðis kommunu, sum eisini fevnir um Ljósáir og Svínáir, fáa somu sømdir.

- Eg hugsi serliga um ferðsluviðurskiftini í Svínáum, sum eru út av lagi vánalig. Dagliga koyra bilar við alt ov nógvari ferð gjøgnum bygdina - og sjálvur eri eg næstan vorðin yvirkoyrdur av skilaleysari koyring á bygdarvegnum.

## Myrkasta bygd

Dan fýlist eisini at gøtuljósunum í Svínáum, sum hann heldur vera alt og fá.

- Eg haldi, at Svínáir er myrkasta bygd í Føroyum. Eftir bygdarvegnum eru bert seks gøtuljós, og oman til kaiøkið eru eingi ljós.

Hann sigur, at tað er bæði ótrygt og vandamikið at ganga úti um kvøldarnar, tí vegurin er so illa upplýstur.

- Her í Svínáum hevur rætt og slætt einki verið gjørt í nógv ár. Skulu fólk trívast og støðast í bygdini - og skal nøkur menning verða, noyðist Eiðis bygdaráð at geva okkum somu sømdir, sum fólk í kommununi annars.

Dan heldur, at ein gongd leið fram ímóti líkinda viðurskiftum hevði verið at fingið fleiri gøtuljós fram við bygdarvegnum og oman til kaiøkið.

- Vit eiga eisini at fáa vegaforðingar á bygdarvegin og fleiri gøtuljós. Aftrat hesum eiga skelti, sum vísa loyvdu hámarksferðina, at verða sett upp.

## Vandamikið

Eiðismaðurin, sum býr í Svínáum, sigur, at tað er væl meira tung ferðsla eftir bygdarvegnum, enn fólk hugsa sær, og her er talan um bæði trailarar og lastbilar.

Spurdur, um onkur koyrir eftir bygdarvegnum heldur enn landsvegnum omanfyri, tí tað kann tykjast stuttligari at koyra eftir tí smala vegnum, sigur Dan:

- Ja, tað er nokk ikki frítt, at ung fólk stundum hava hug at stuttleika sær á bygdarvegnum.

Hann sigur, at tað var eini slíkari hending, hann var úti fyri seint í summar.

- Eg stóð á vegkantinum við garðin hjá grannanum, tá ið tveir bilar komu kappkoyrandi suður gjøgnum bygdina.

Dan sigur, at hann kendi ikki bilarnar, men tað restaði ikki nógv í, at hann kom rættiliga illa fyri, tá ið ungu bilførararnir fuku fram við.

Hann sigur, at nýggi býlingurin norðast í bygdini hevur gøtulós, men á leiðini suður til gamla býlingin standa tvey hús.

- Eg haldi, at Eiðis bygdaráð eigur at taka seg um reiggj og gera nakað her suðuri, sigur Dan Kruse Thomsen.

# Ljósini í Svínáum krevja ábøtur

**- Eg haldi, at sitandi bygdaráð hevur gjørt nokso fitt fyri at bøta um umstøðurnar í Svínáum, men eg ásanni, at neyðugt er at gera nakað við eitt nú ljósini í bygdini, sigur Tordur Niclasen**

SVÍNÁIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tordur Niclasen, bygdaráðsformaður á Eiði, er samdur við Dan Kruse Thomsen í Svínáum, um, at gamla bygdin er alt og myrk, og at neyðugt er at seta fleiri ljós upp við bygdarvegin.



*- Eg dugi ikki at siga, um vegaforðingar verða gjørdar á bygdarvegnum, tí eingin avgerð er tikin um tað. Men persónliga haldi eg, at hetta er einasta loysnin, um ferðin eftir vegnum er ov nógv, sigur Tordur Niclasen*

## Ljós og ferðsla

- Ljósini við vegin eru ikki nøktandi, og bygdaráðið fer at fremja neyðugu ábøturnar.

Tordur sigur seg fegnast um, at borgarar gera vart við viðurskifti, sum ikki eru nøktandi.

- Eg dugi ikki at siga, um vegaforðingar verða gjørdar á bygdarvegnum, tí eingin avgerð er tikin um tað í bygdaráðnum. Men persónliga haldi eg, at hetta er einasta loysnin, um ferðin eftir vegnum er ov nógv. Tað vísa eisini kanningar, sum gjørdar eru.

Spurdur, hvussu verður við vegnum omaná lendingina, har eingi gøtuljós eru, sigur Tordur, at hetta dugir hann ikki at meta um í løtuni.

- Men bygdaráðið fer at gera tær ábøtur, sum mettar eru at verða neyðugar.

## Ymiskt er gjørt

Bygdaráðsformaðurin í Eiðis kommunu sigur, at sitandi bygdaráð hevur gjørt ymiskt, sum hevur verið til bata fyri Svínáir.

- Vit hava fingið kloakkviðurskiftini í rættlag, fingið í lag støðuga vatnrenning, og vit hava eisini sett upp eitt tiltrongt busskýli.

Tordur Niclasen sigur, at nógv grundøkir eru til sølu í Svínáum, og hesi liggja um 50.000 krónur hvørt.

- Eg vil siga, at vit hava gjørt nokso fitt til tess at bøta um viðurskiftini í bygdini, men eg ásanni, at enn liggur ymiskt á láni, sum krevur ábøtur, sigur hann at enda.